## Fornminnafelag jólasølu

Í morgin og sunnudagin skipar fornminnisfelagið á Eiði fyri jólasølu, har fólk fáa høvi at ogna sær ymsar heimagjørdar lutir. Á jólasøluni eru millum annað heimagjørdir bundnir og seymaðir lutir umframt nógv annað jólaligt. Jólasølan hjá Eiðis fornminnisfelag er í húsunum á Látrinum og er opin í morgin frá klokkan 14 til 20 og sunnudagin frá klokkan 14 til 18. Tey, sum støkka inn á gólvið, kunnu keypa sær kaffi og okkurt afturvið.



## Gjaldoyra frá ferðavinnu

Íslendingar fáa altsamt størri inntøkur av fremmandum gjaldoyra burtur úr ferðavinnuni. Ein uppgerð hjá Seðlabanka Íslands fyri níggju teir fyrstu mánaðarnar í ár vísir, at hetta tíðarskeiðið gav ferðavinnan 15 prosent størri gjaldoyrainntøku enn somu mánaðir í 2006. Ferðavinnan skrásetti 16,5 prosent fleiri ferðafólk níggju teir fyrstu mánaðirnar í ár enn í somu mánaðir í fjør, og hagtølini vísa, at bretar og skandinavar eiga tann størsta vøksturin.

# Spenningur í løgtinginum

**Dagurin í gjár var merktur av stórum spenningi millum tingfólk. Neyvan man løgmaður í stjórnartíð síni hava verið so kroystur, tí tað breyt veruliga í bæði borð**

POLITIKKUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað byrjaði longu frá morgunstundini av.

Sosialurin tosaði við Kaj Leo Johannesen tíðliga á morgni, í formaður Sambandsfloksins hevði nevniliga givið ilt av sær í løgtinginum dagin fyri, har hann førdi fram, at hildu samgongulimir ikki uppat at fiska í sjálvdrátti, so vildi Sambandsflokkurin ikki sigla við meir.

Tað, at samgongulimír leggja uppskot fram av sínum eintingum, kann stutt sagt ikki góðtakast, segði Kaj Leo Johannesen við Sosialin í gjár.

Hann segði eisini, at hann fór at krevja ein fund við hinar báðar formenninar í samgonguflokkunum har greiða skuldi fáast á, um flokkarnir vóru sinnaðir at fylgja fíggjarlógarsemjuni, sum gjørd var í síðstu viku.



*Tað var næstan sum at bíða eftir Goudot, men Kaj Leo Johannesen kundi at enda boða frá, at hann hevði tikið eina støðu – sum hann ikki vildi siga, hvør var. Hetta kom tó fram seini um kvøldið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tí, sum hann segði, var eingin fíggjarlógarsemja, var heldur eingin samgonga.

Løgmaður var staddur uttanlands til fiskivinnusamráðingar við ES, og hann fekk sanniliga onga »standing ovation« tá hann kom heimaftur við einari fyri so vítt rættiliga góðari avtalu. Fyrst var hann kravdur á samgongufund, og – sum um tað ikki var nóg mikið – fekk hann sanniliga eisini eitt misálit sett fram ímóti sær.

Hetta misálit var lagt fram, meðan teir tríggir floksformenninir sótu á fundi.

Og hóast tað framman undan hevði verið okkurt graml um hetta í »korridorunum«, høvdu samgongutingmenn týðiliga ikki roknað við, at misálitið kom so knappliga.

### Steðga samgonguni

Tað var heilt týðiligt, at misálitið varð lagt fram av andstøðuni fyri at brúka so nógva arbeiðstíð upp hjá samgonguni sum gjørligt. Andstøðan visti framman undan, at uppskotið ongan møguleika hevði fyri at koma ígjøgnum, eisini – men ikki bara – tí, at ein av andstøðutinglimunum ikki vildi stuðla misálitinum.

Hetta tóktist eisini púra greiða endamálið við uppskotinum, tá andstøðulimir ein eftir annan trinu á tingsins røðarapall, meðan samgongulimir vóru merkiliga tigandi.

Kortini var tað fundurin í Sambandsflokkinum, sum gjørdist meiri spennandi málið sum seinnaparturin leið. Vantandi áhugin hjá samgongulimum at taka orðið í málinum um misálit á løgmann saman við bíðanini eftir einum úrsliti frá fundinum í Sambandsflokkinum gjørdi, at bæði samgongulimir og miðlafólk mistu áhugan fyri umrøðuni í tingsalinum. So hesi saman við teimum andstøðulimum, sum »ikki áttu tørn« á røðarapallinum, savnaðust í gongini í tinghúsinum.

Tá so klokkan nærkaðist hálvgum átta á kvøldi, kundi Kaj Leo Johannesen endiliga boða frá, at Sambandsflokkurin hevði tikið eina støðu. Men hann vildi kortini ikki upplýsa, hvør hendan støðan var, tað skuldi bíða, til triðja viðgerð av málinum um broytingar í vallógini komu fyri.

Formaðurin í sambandsflokkinum kundi tó vátta, at teir ikki fóru at slíta samgonguna, men tað lá kortini í luftini, at teir heldur ikki skuldu roknast sum trúgvur stuðlar til triðju viðgerðina um broytingar í vallógini.

So menn vóru eitt sindur í iva um, hvussu teir skuldu lesa støðuna hjá Sambandinum. Men eitt stóð í hvussu er fast: Kaj Leo Johannesen var »centre og attention« í løgtinginum í gjárkvøldið.

# Tendra átta jólatrø í Tórshavnar kommunu

**Komandi vikuskifti verða tey seinasta jólatrøini í kommununi tendrað, uttan tað í Syðradali, ið verður tendrað um eina viku. Jólatræið í Kirkjubø verður tendrað nú fríggjakvøldið kl.19.**

JÓL

Jólatræið á Velbastað verður tendrað leygardagin kl. 16. Tað verða Jógvan Arge, býráðslimur, og Kristine Hestbech, prestur, ið tala. Havnar Hornorkestur spælir hugnaligan jólatónleik, tá træið verður tendrað, og jólamaðurin vitjar. Jólatiltak verður í skúlanum.

Klokkan 18.00 verður træið tendrað á Hvítanesi. Har fara Annika Olsen, býráðslimur, og Hanus Simonsen, prestur, at halda røðu. Jólamaðurin kemur á vitjan, og tey fara at bjóða drekkamunn í skúlanum á Hvítanesi.

Sunnudagurin 9. desember verða ikki færri enn seks jólatrø tendrað ymsastaðni í kommununi.

Í Kaldbak verður tendrað klokkan 15.30, har Jan Christiansen, býráðslimur, og Hanus Simonsen, prestur, fara at halda røðu. GHM spælir, og jólamaðurin kemur við brandbilinum úr Kollafirði. Drekkamunnur verður at fáa í skúlanum.

Á Argjum fara tey at tendra jólatræið við brúnna um Sandá klokkan 17.00. Har fara Jógvan Arge, býráðslimur, og Heri Joensen, prestur, at halda røðu, og GHM fer at spæla. Ein skúlaflokkur á Argjum bjóðar drekka og hevur sølubás frá kl. 15. Í ár fær jólamaðurin stundir at vitja á Argjum.

Í Norðradali verður træið tendrað klokkan 18.30. Heðin Mortensen, borgarstjóri, og Heri Joensen, prestur, halda røðu, og eisini í Norðradali fer GHM at spæla jólaløg. Í Norðradali bjóða tey ein drekkamunn í skúlanum.

Í Kollafirði verður verður stórt adventstiltak í ítróttarhøllini kl. 15, har verður borðhald, og korið Dropar syngur, og Marjun Bæk, prestur, heldur røðu. Kl. 17 verður træið tendrað við skúlan, og dansað verður um træið.

Í Nólsoy verður jólatræið tendrað sunnudagin klokkan 15.30. Havnar Hornorkestur verður í Nólsoy hendan dagin, Hildur Eyðunsdóttir, býráðslimur, og Sverri Steinhólm, prestur, halda røðu og tendrað træið. Í Nólsoy eru tey so heppin, at hava egnan jólamann. Hann býr har úti, so hann kemur sjálvandi framvið sunnudagin. Eisini nólsoyingar og tey, sum vitja í Nólsoy sunnudagin, fáa ein drekkamunn, tá jólatræið er tendrað.

Jólatræið í Hesti verður tendrað klokkan 14.30. Heri Joensen, prestur, fer at halda røðu. Eisini í Hesti bjóða tey ein drekkamunn, tá træið er tendrað og jólamaðurin vitjar.